Kunnað verður á
**kvf.fo/talgilt**
og í sjónvarpinum,
so hvørt sendararnir
verða sløktir.

# Kunning um móttøku av sjónvarpssendingunum hjá KvF

# í Sumba






Antennan skal peika móti sendaranum,
tú fært signal frá.

Á heimasíðuni hjá Televarpinum **tv.fo**
sært tú, hvønn veg antennan skal peika.

## Talgilding av sjónvarpsnetinum

MENTAMÁLARÁÐIÐ
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn
Tel. +298 30 65 00
mmr@mmr.fo
www.mmr.fo

# Frá analogum til talgilt sendinet

Gamli analogi sendarin á Hestinum er nú í so ringum standi, at tað ber ikki til at gera hann aftur. Tí verður skiftið frá analogu til talgildu sjónvarpstøknina framt í hesi vikuni. Ætlanin var annars, at skiftið skuldi fara fram 25. november 2013.

Analoga senditøknin er ikki tíðarhóskandi longur og er eisini vorðin ov kostnaðarmikil at reka og halda viðlíka. Sendinetið verður tí talgilt við MPEG-4 tøkni, so tað stendur mát við sendinetið í grannalondunum.



## Hvørjir eru fyrimunirnir?

Við nýggju tøknini fært tú betri mynda- og ljóðgóðsku.

## Hvat skal eg gera fyri at síggja Kringvarp Føroya?

Fyri at síggja Kringvarp Føroya er neyðugt at hava:

· **UHF-antennu** (antenna við stuttum pinnum)
· **DVB-T móttakara,** ið kann móttaka Televarpið við MPEG-4 tøkni

Best er at hava antennuna standandi soleiðis, at hon peikar ímóti sendistøðini.

Sært tú longu Kringvarpið umvegis Televarpið, nýtist tær ikki at gera annað enn tað, ið Televarpið mælir tær til.

DVB-T móttakarin kann verða innbygdur í sjónvarpið ella í leysari móttøkuboks.

Hevur sjónvarpið DVB-T móttakara, ber til at seta tað at leita, so finnur tað rásirnar, og harvið finnur tað eisini Kringvarpið. Hevur tú eina eldri VHF-antennu, eigur henda at verða skift út við eina UHF-antennu. UHF-antennan skal kunna taka rásirnar frá 21 til 69.

Talan er um tøkni, sum kann keypast í radio- og sjónvarpshandlum kring landið.

## Hjálp?

Um tú ikki fært sjónvarpið at virka, eftir at sendinetið er umlagt, hóast tú hevur fylgt vegleiðingunum, kanst tú venda tær til Televarpið.

Serkøn fólk sita til reiðar við telefonirnar, tá ið skift verður í teimum ymisku økjunum.

## Ring tel. 340 340

Gerandisdagar millum kl. 09.00-18.00.